# Føroyar í ævir

**- Hjá mær at vakna í hjartanum á Føroyum ólavsøkumorgun, er sum hjá einum barni jólaaftan at vakna undir sjálvum jólatrænum. Men mínar gávur eru ikki pakkaðar inn í glitrandi pappír. Mínar gávur eru tit, landsmenn. Bankandi føroysk hjørtu, klødd í fornan føroyskan búna, segði útisetin Haraldur í talu sínari til tjóðina ólavsøkukvøld. Les røðuna her**



ÓLAVSØKURØÐA
*Haraldur*

Landsmenn! Ólavsøkugestir! Æraða fjøld! Føroyingar!

At stíga fram fyri tykkum hesa nátt, er fyri meg sum at stíga fram fyri sjálvan drottin jólanátt. Ein æra so stór, at eg sat í tímar og kundi ikki festa á blað tey orð, eg vildi bera fram fyri tykkum.

Ikki tí – eg havi hildið manga talu sum hesa áður. Men eg havi aldrin havt aðrar áhoyrarar enn meg sjálvan. Mínar talur hava verið vendar til mín til tess at eggja meg at halda fram við kampinum fyri at mítt hjarta altíð skal sláa eina føroyska takt.

Tá eg hevði sitið ein tíma ella tveir og einki orð skrivað, gekk eg mær út í hjall og skar mær spik so gott, at eg stórgræt tá eg legði tað undir tonnina.

Men eg stóð eisini har í hjallinum og stórgræt av tankanum um, at tað, eg vanliga leggi undir góman, er medistari úr Føtex.

Føroyingar! Tað er órógv í mínum sinni. Míni sál vantar javnvág. Tað er ósamsvar millum tann, eg eri, eg tað, eg geri.

Seyður livir ikki í sjógvi, toskur ikki á landi, og eg livi ikki umgyrdur av donskum skvaldri. Eg bara ani sum ørn í búri.

Sum grasið, ið vit stundum síggja trýsta sær veg upp gjøgnum asfalt, soleiðis má eg hvønn dag trýsta og berja meg gjøgnum eina tjúkka dýnu av kleiggjutum donskum pjatti fyri at yvirliva um føroyingur.

Luftin eg dagliga andi er so tjúkk er av vrevli og fjanti, at tað at draga ondina mangan kenst mær sum at draga móru niður í lunguni.

Hvør dagur er hjá mær ein bardagi fyri tí føroyska. Ikki tí eg vænti, at konan ella dóttirin ella tann ótolandi moster Yvonne nakrantíð verða føroyingar. Eg haldi fram at stríðast fyri at tær ikki skulu broyta meg.

Eg veit at eg mangan kann tykjast bondskur. Beiskur. Illur og ótolin. Men eins og hin ásttikni unglingin pínist tá hann má vera burturi frá síni kæru, so pínist eg, tá eg má vera burturi frá Føroyum.

Tað er hart at noyðast einsamallur í ein kjallara tá tú vilt skipa Sjúrðarkvæðini. Rákin av turrari grind er ikki tann rætti, tá tínar borðfelagar eta flæskesteg med rødkål. At tosa um kappastríð og hetjubrøgd við danskar frúur er sum at fara upp á gólv við einum gásaflokki. At hoyra danskt mál úr munninum á egnu dóttir míni, kenst sum at drekka spilta mjólk úr gullkaliki.

Men í kvøld, landsmenn! Í kvøld – ólavsøkukvøld! – er eingin pína; eingin beiskleiki! Í kvøld er veitsla, í kvøld er gleði og javnvág! Í kvøld dansi eg við míni andans brúður!

Hjá mær at vakna í hjartanum á Føroyum ólavsøkumorgun, er sum hjá einum barni jólaaftan at vakna undir sjálvum jólatrænum.

Men mínar gávur eru ikki pakkaðar inn í glitrandi pappír. Mínar gávur eru tit, landsmenn. Bankandi føroysk hjørtu, klødd í fornan føroyskan búna.

Tá eg hugsi um hvussu tit í gjáramorgunin pussaðu knapparnar til klæðini, berst mær fyri at tit pussaðu okkara tjóðskaparliga førning, so hann aftur kann skyggja blankur í sólini.

Og tá eg nú síggi tykkum í kvøldarljósinum... eri eg aftur um at stórgráta. Gráta av gleði og gráta av longsli eftir at vera partur av tykkum.

Eg veit, at summi ikki skilja meg.

Eins og tann fiskur ið aldrin hevur spraklað uppi á turrum ikki dugir at virðismeta tilveruna í sjónum, soleiðis duga tit at virðismeta, at tit sum føroyingar búgva í Føroyum.

Tí er hetta mín áminning hetta vakra kvøld: Tit eru fiskurin í sjónum, seyðurin í haganum, fuglurin í berginum, sílið í ánni. Tit eru føroyingar í Føroyum!

Tað er tykkum so sjálvsagt sum luftin, tit anda – og tí gáa tit kanska ikki um, hvussu stórt tað er.

Men um tit hvønn dag dugdu at virðismeta tykkara veldugu, dagligu gávu, so hevði verið minni flokkadráttur og minni klandur í landinum.

Liðfelagar klandrast ikki, tá dómarin bríkslar eftir vunnan dyst. Og tit eru vinnarar hvønn einasta dag, hvønn tíma, hvørja løtu.

Tit eru eitt við klettar og fjøll. Eitt við mál og mentan. Eitt við fortíð og framtíð. Eitt við landið; eitt við tjóðina. Og okkara tjóð sigrar hvønn dag, bara við at vera til.

Um mær varð boðin størsta høll og hon var skrýdd í gulli øll, tó faðirs smátta mær er meir, tí hon er eittans, ikki fleir.

Verið góð við smáttuna, farið væl við henni, røkið hana, verjið hana.

Eg geri tað harða arbeiði. Eg dreni uttan um til tess at forða fyri, at ov nógv óhumska setur at smáttuni. Onkur annar málar vindeygu, og onkur tendrar tey vøkru ljós, ið brenna í longum, mjáum stakum í stovuni.

Smáttuna røkja vit – tjóðina skapa vit – við okkara atferð sum einstaklingar. Við at seta okkum tað góða, tað vakra, tað sanna – tað føroyska! – sum mál, og aldrin víkja frá tí.

(Tað er hvussu vit megna hetta, sum skilir teir góðu føroyingarnar frá teimum ringu.)

Tá Hans Andrias fortelur okkum at Katrin býr á strondini, so sigur tað okkum ikki so nógv um Katrina. Men tá hann sigur at Katrin býr á strondini og Katrin hon er fitt – ja, so er tað sum um, at vit øll kenna hana. Hon er jú fitt. Vit síggja hana fyri okkum. Vit vita hvussu tað er at støkka inn á gólvið hjá Katrini. Vit kenna angan av henni. Tí vit vita at hon er fitt! Hon umboðar tað góða og vakra.

Katrin bíðar tolin í Føroyum, meðan ...

Sørin er í Íslandi – í Íslandi er kalt.

Sørin fiskar íslandstosk og leggur hann í salt.

Landsmenn! Katrin er Føroyar! Og Føroyar eru tann hjúnarfelagin, sum ikki bara Sørin, men vit øll eiga í andanum!

Um sangurin segði at Katrin býr á strondini og Katrin er sakførari, so hevði hon framvegis verið okkum fremmand. Sama um tað stóð, at Katrin er tjúkk ella Katrin er rík.

Men vit kenna hana, tí hon er fitt. Hon er Føroyar. Og hon er ikki rík...

"Katrin eigur ikki jørð og neyvan borð og disk, strevast við at vaska posar og at turka fisk." Men…

"Sólin brennir brúnan kinn og bleikir gula hár, kagar inn í eyguni, so djúp, so rein og klár."